# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Fyri hvørjar 10 minuttir, sum gingu, uttan at teir høvdu skorað, taldu vit seinastu sekundini í felag og gjørdu so eitt ordans brøl*

*Birgir Sondum*

# Vit áttu Strøget

**Morreyðu troyggjurnar, føroysku húgvurnar og hvítbotnaðu gummiskógvarnir skaptu móta, tá eitt óvæntað stórt ferðalag fyri 18 árum síðani setti kós móti Landskrona**



*Sum fótbóltsupplivíng stendur tann 12. september 1990 oman fyri alt, sum Birgir Sondum hevur upplivað. Um 10 dagar er møguleiki hjá dagsins føroyska landsliði at endurtaka bragdið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Millum teir á leið 1.400 áskoðararnar, sum vóru í Landskrona tað minniliga heystarkvøldið í 1990, var eisini Birgir Sondum. Og hjá honum er eingin sum helst ivi um, at hetta var størsta upplivingin, sum hann hevur havt saman við landsliðnum.

- Tað er als eingin ivi um tað. Tað mundu ganga mánaðir, áðrenn tú veruliga fataði, hvussu stór hending hetta var, og enn í dag kunnu fólk spyrja »vart tú eisini har?«. So tað er eingin ivi um, at hetta er nakað, sum hevur nomið djúpt við allar føroyingar.

## Stuttligur túrur

Og søgurnar eru mangar, tá Birgir greiðir frá ferðini, sum byrjaði við Føroyingahúsið í Keypmannahavn.

- Talan var í veruleikanum um brúðarferð, tí eg var júst giftur. Men konan var upp á vegin, so hon kom slettis ikki við.

- Men vit skuldu so øll møtast í Føroyahúsinum. Hvørji klæði vit skuldu í, vistu vit ikki reiðiliga. Tjóðbúnin var kanska dekan ov fínur til endamálið, so tað endaði við, at vit fóru í morreyða troyggju, hvítbotnaðar gummiskógvar og føroyska húgvu. Og uttan at vita tað, skaptu vit við hesum mest sum fasta búnan hjá føroysku áskoðarunum.

- Og har var eitt sindur av kaos, tá vit skuldu avstað. Áhugin var nógv størri, enn nakar hevði væntað, og tí vóru alt ov fáir bussar til áskoðararnar. Vit fingu so fatur á fleiri bussum, og so var bara at herja avstaðm, sigur Birgir.

## Róptu fyri hvørjar 10 minuttir

Og sjálvandi var talan eisini um sera minniligan dyst.

- Hetta stendur sjálvandi oman fyri allar aðrar dystir, sum eg havi verið til. Tað varð jú roknað við, at Eysturríki skuldi vinna eini 10-0, so fyri hvørjar 10 minuttir, sum gingu, uttan at teir høvdu skorað, taldu vit seinastu sekundini í felag og gjørdu so eitt ordans brøl. Sum so høvdu vit als ikki nervar, men eftir at Torkil hevði skorað, gjørdist heilt galið.

- Og so var sjálvandi eitt øgiligt ball á heimferðini. Har var føroyskur dansur á ferjuni til Helsingøt, og komnir í land tømdu vit ein heilan smyrjibreyðshandil, tí mat máttu vit eisini hava. Strøget varð sjálvandi eisini hertikið, og danir – sum vit jú skuldu hitta í næsta landsdystinum – yvirgóvu seg fult og heilt.

## Eysturríki er serligt

Áhugin fyri landsliðnum hevur kanska verið fallandi seinnu árini. Men Birgir Sondum ivast ikki í, at hetta verður øðrvísi, nú vit aftur spæla móti Eysturríki.

- Fyrstu árini var eg til nógvar útidystir, eins og eg var til allar heimadystir. Tá kendi eg eisini heilt væl summar av spælarunum, men tann parturin er sjálvandi øðrvísi í dag. Men eg vóni, at hesin dysturin veruliga kann blásast upp til nakað stórt, tí Eysturríki er serligt. Kanska var tað spell, at Hickersberger segði seg frá sum venjara, tí tað kundi nú verið stuttligt, um vit góvu honum sekkin eina ferð afturat. Men eg ivist onga løtu í, at hetta er ein dystur, sum veruliga kann motivera spælararnar, og tað ikki minni, nú talan eisini er um seinasta heimadystin hjá Jógvan Martini sum landsliðsvenjara, sigur Birgir Sondum.

# Skulu fylla stadion

**Saman við FSF hevur Miðlahúsið sett sær sum mál at fylla Tórsvøll, nú Eysturríki kemur á vitjan**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

805 áskoðarar móti Rumenia var ikki nøktandi. Ikki minst hjá spælarunum var talan um vónbrot, at stuðulin var somikið fámæltur til seinasta heimadystin.

Nú kemur Eysturríki á vitjan, og eingin ivi er um, at hetta er nakað, sum eigur at kunna økja um føroyska 12. mannin. Ein 12. maður, sum á einum góðum degi kann lyfta liðið móti næstu veruligu sensatiónini, sum vit nú hava bíða eftir so leingi.

- Tað snýr seg um at økja um áhugan. Snøgt sagt at hypa dystin upp og fáa fólk at trúgva, at vit kunnu skapa sensatiónina einaferð afturat, sigur Jonhard Hammer, stjóri á Rás2.

- Men skulu vit tað, so er eisini neyðugt, at vit stuðla teimum 11, sum eru á vøllinum. Eg var sjálvur við í Landskrona, tá vit vunnu móti Eysturríki, og tað var ein heilt fantastisk uppliving, og okkara mál er at endurskapa hesa, segði Jonhard Hammer millum annað, tá hann var gestur á Rás2 í morgunsendingini.

# Berbatov søkti AaB

**Dimitar Berbatov gav tvær orsøkir til, at Manchester United brúkti 300 milliónir upp á seg. Og á útivølli hálvkiksaði Juventus móti Borisov úr Hvítarusslandi**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ensku meistararnir komu sær ikki í óvæntaðar trupulleikar, tá Manchester United í gjárkvøldið vitjaði AaB á Aalborg stadion.

Hóast AaB í løtum var væl við í dystinum, so var meira ella minni klassamunur á liðunum, og tað var uppiborið, at Rooney legði gestirnar á odda. Tað skuldi tó eitt stórt verjumistak til, áðrenn Dimitar Berbatov kundi punktera dystin við málinum til 2-0, og tá hann seinni økti til 3-0 var hetta kanska at rokna sum fyrsta avdragið upp á tær 300 milliónirnar, sum Manchester United hevur goldið fyri hansara tænastu.

Aðrastaðni var tað óvæntað, at Juventus máttu taka til takkar við 2-2 javnleiki í Hvítarusslandi móti Borisov, meðan Arsenal veruliga ressaðist eftir eyðmýkjandi 2-1 tapi móti Hull um vikuskiftið. Hesa ferð við greiðum 4-0 sigri móti Porto.

**Úrslitini týskvøldið**

AaB-Man Utd 0-3
Villarreal-Celtic 1-0
Fiorentina-Steaua 0-0
Bayern M-Lyon 1-1
Arsenal-Porto 4-0
Fenerbache-Dynamo Kiev 0-0
Zenith-Real Madrid 1-2
Borisov-Juventus 2-2

**Dystir mikukvøldið**

Cluj-Chelsea
Bordeaux-Roma
Famagusta-Panathinaikos
Inter-Werder Bremen
Shakhtar-Barcelona
Liverpool-PSV
Atletico M.-Marseille
Sporting L.-Basel